# Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-610 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

## Arbeiðsmaður til Runavíkar Kommunu

Søkt verður eftir dugnaligum og sjálvstøðugum arbeiðsmanni at taka sær av serøki á vegadeildini í Runavíkar Kommunu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Teknisku Deild, Jógvan D. Jakobsen, tlf. 417025.

Skrivlig umsókn skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 12. desember 2007 kl. 12.

Runavíkar kommuna
Postboks 139
610 Saltangará

## Frá Norðoya Javnaðarfelag

3. uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður mikukvøldið 28/11 kl. 19.00 í Nólsoyar Pállsgøtu 7. Við á fundinum verða løgtingslimir. Allir limir eru vælkomnir og nýggir limir kunnu tekna seg.

***Nevndin***




> Telefonráðgeving
> Anonymitet
> Tagnarskyldu
> Stundir at lurta

Bláí Krossur
www.blakross.fo

# Starv á Føroya Barnaheimi

Barnaheimið søkir við hesum eftir einum pedagogi til Ungdómsdeildina at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 2. Januar 2008 ella eftir nærri avtalu. Pedagogar, sum verða lidnir í februar mánaði 2008, eru eisini vælkomnir at søkja. Tann ið settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Ungdómsdeildini, har tað er pláss fyri 6 børnum í aldrinum 12 – 18 ár. Harumframt er eitt bráðfeingispláss.

**Um Ungdómsdeildina:**

Á Ungdómsdeildini eru 8 fólk í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðnum á Ungdómsdeildini er, at støði verður tikið í tí einstaka barninum, har dentur fyrst og fremst verður lagdur á umsorganina, vegleiðingina og eygleiðingina. Skaptir verða karmar rundanum barnið, soleiðis at reglusemi kemur í gerandisdagin. Tá talan er um tørvir og ynskir hjá barninum, verður altíð í hvørjum einstøkum føri tikið hædd fyri aldur og førleika annars.

**Førleikakrøv:**

Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur ávísan kunnleika til at arbeiða við børnum og ungum. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevni. Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.

Ein partur av arbeiðnum er skrivligt arbeiði, og umráðandi er, at viðkomandi dugir væl at málbera seg bæði í skrift og talu.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 09.12.2007.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ulrik Jensen, deildarleiðara ella Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

# Reingerðarfólk

Vit sóknast eftir fólki til reingerð. Vinarliga ring 604174 eftir kl.12 ella 214175.

**SP/F DVEYLAN**

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Bioanalytikari

Í samband við økt virksemi søkir Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eftir einum bioanalytikara at byrja skjótast til ber. Full arbeiðsvika, men møguleiki er fyri niðursettari tíð.

**Førleikakrøv**
- bioanalytikaraútbúgving
- teldukunnleika

Við tað, at deildin hevur fleiri granskingarverkætlanir í gongd í senn, er ynskiligt, at umsøkjarin er fleksibul, soleiðis at hann kann laga seg til tær ymisku granskingarætlanirnar.

Deildin hevur, síðan hon varð sett á stovn í 1988, skipað fyri ymiskum granskingarvirksemi innan bæði arbeiðslæknafrøði og fólkaheilsu. Hetta virksemi, sum hevur verið í neyvum samstarvi við starvsfelagar í Evropa, USA og Asia, er fíggjað við peningi frá almennum og privatum grunnum í Føroyum, USA, ES og Danmark. Ein megintáttur í granskingini er, hvussu dálkingin av heimshøvunum ávirkar heilsuna hjá føroyskum børnum - og nú eisini hjá vaksnum fólki. Á deildini starvast í løtuni 15 fólk.

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið

Umsóknarfreistin er 17. desember kl. 12.00.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. nr. 316696 ella 216696 til Pál Weihe, yvirlækna, ella t-post pal@health.fo.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skal sendast til:

**Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu**
Sjúkrahúsverk Føroya
Sigmundargøtu 5
Postsmogu 14
FO-110 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo




Lesið Sosialin -so eru tit við!